Lýsing eftir

# pedagogi til Vípuna

Sjálvsognarstovnurin Vípan søkir eftir 1 pedagogi 30 tímar til at byrja 15. august 2007 ella eftir nærri avtalu. Talan er um varðaleiðarastarv.

Vípan er ein barnagarður við børnum í aldrinum frá 2-8 ár. Eftir summarfrítíðina fer Vípan at taka ímóti børnum frá 2-8 ár. Hettar er fyrsta árið, Vípan fer at taka í móti frítíðarskúlabørnum og vøggustovubørnum.

Stovan har tú kemur at arbeiða er ein barnagarðsstova við børnum frá 2-5 ár. Arbeiðstíðinar eru skiftandi, frá 7.30-17.00.

**Vit bjóða eitt áhugavert starv:**
- har náttúran hevur stóran leiklut í gerandisdegnum og har spæl fyllir nógv
- har virðing og trivnaður hjá barninum er í hásætið
- við opinleika og einum jaligum hugburði
- við broytingum har tú hevur tína ávirkan

**Vit vænta av tær:**
- At tú ert útbúgvin pedagogur/hevur royndir og fagliga vitan
- At tú kanst arbeiða sjálvstøðugt og taka avgerðir
- At tú ert opin fyri broytingum
- At tú hevur góð samstarvsevnir yvir fyri børnum, foreldrum og starvsfelagum
- At tú sært fyrimunir fram um vansar

Um pedagogur ikki søkjur, verður hjálparfólk sett í starvið.

Nærri upplýsingar um starvið fáast við at venda sær til Eyð Skúvadal, leiðara á tlf 317535/ 287535

Umsókn saman við avrit av prógvum og viðmælum, skal vera stovninum í hendi, seinasta lagi 27.07. 2007

## Vípan

Vípuvegur 3 · 100 Tórshavn
Tlf. 317535 / 287535
bg-vipan@post.olivant.fo

Almanna- og Heilsumálaráðið

## Avmarkað avgreiðsla í summarfrítíðini

Almanna- og heilsumálaráðið fer í summarfrítíðini frá

**16. juli - 3. august 2007**

bert at avgreiða tey mest neyðugu og átrokandi málini.

Hetta tíðarskeiðið verður avgreiðslan avmarkað, soleiðis at telefonin og avgreiðslan eru opin millum kl. 10-12 allar gerandisdagar. Avgreiðslan virkar aftur sum vanligt frá mánadegnum 6. august 2007.

EIRARGARÐUR 2 • 100 TÓRSHAVN • TELEFON 30 40 50
TELEFAX 35 40 45 • E-MAIL: AHS@AHS.FO

**Toll- og Skattstova Føroya**

## Størv innan MVG á Miðøkinum eru leys at søkja

**Er hetta nakað**
ið tú hevur hug at royna, so verða størvini sett 1. sept. ella so skjótt sum tilber.

**Vit eru**
ein livandi stovnur við støðugum broytingum, sum skal tillaga seg lógarbroytinum og umstøðum annars. Tí er neyðugt, at tú, ið settur verður tolir broytingar í starvsinnihaldinum um tað skuldi gjørt neyðugt.

**Vit ímynda okkum**
at tú hevur hægri útbúgving sum HD ella aðra líknandi, hevur góð samstarvsevnir, skapar úrslit og gert títt til at skapa arbeiðsgleði.

Skuldi tú havt HH, skrivstovuútbúgving ella aðra líknandi og ætlar at útbúgva teg víðari innan roknskap og grannskoðan, so ert tú eisini vælkomin at søkja.

**Arbeiðsuppgávur:**
- samskifti við virkir og stovnar
- vitja fyritøkur
- málsviðgerð
- ummæla kærur

**Vit bjóða:**
- fjølbroytt og sjálvstøðugt arbeiði í nýggjum bygnaði, har tú hevur møguleika at ávirka arbeidsgongdina
- fakligar avbjóðingar og møguleikar fyri eftirútbúgvingum
- flekstíð

**Setanartreytir:**
Setanarøkið er Miðøkið, men starvið fevnir annars um allar stovnar undir Fíggjarmálaráðnum. Løn- og setanarviðurskiftir, sum eru treytað av starvsroyndum, starvsinnihald og útbúgving, eru eftir sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og avvarðandi yrkisfelag.

**Umsóknir:**
Send umsókn við avriti av prógvi og upplýsinum um útbúgving og fakligar royndir til:

**Toll- og Skattstova Føroya, Miðøki**
Postboks 2151
FO- 160 Argir
Stílað: Vilhjálmur Gregoriussen, økisstjóra

Umsóknarfreist: 17. august 2007

Fleiri upplýsingar fært tú við at venda tær til Eyðun Joensen, deildarleiðara ella Vilhjálm Gregoriussen, økistjóra á tlf. 352600

## Hús í Trongisvági til sølu!

Húsini liggja á grundøki uppá 1000 fermetrar í sera góðum umhvørvi, tætt við ítróttarhøll, skúla og barnagarð.

Húsið sjálvt er 150 fermetrar til støddar í hvørjari hædd, har kjallarin mest sum er ráur, tó við 24 fermetra stórum kamari + hjall og fýrrúm.

Ovara hæddin er innrættað við 3 kømurum og 1 stórum hjúnarrúmi við altan, køki, stórari stovu - 1 baðirúm og 1 wc, útigangi og vaskirúmi.

Garður/stakit er runt um húsið. Urtagarðurin vendur ímóti høvuðsvegnum.

Húsini verða seld um hóskandi boð fæst.

Nærri fæst at vita við at ringja á telefon 225841.

MIÐVÁGS-SANDAVÁGS SKÚLI



## Varaskúlastjóri

Starvið sum varaskúlastjóri í Miðvágs-Sandavágs skúla verður lýst leyst til setana frá 1. august 2007.

**Søkt verður eftir varaskúlastjóra, sum**
- undir ábyrgd skúlastjórans og í samstarvi við hann, starvsfólk og samstarvspartar skúlans annars skal taka lut í fyrisitingarligu og námsfrøðiligu leiðslu og virksemi skúlans
- dugir at samstarva, er virkisfúsur og fyrikomandi
- er fúsur at taka við avbjóðingum og broytingum og taka á seg uppgávur í samstarvi og eftir fyriskipan skúlastjórans
- leggur dent á stundvísi, nærlagni, fakliga og námsfrøðiliga menning.

**Harumframt skal varaskúlastjórin**
- vera næsti medarbeiðari skúlastjórans og saman við honum átaka sær fyrisitingarliga ábyrgd
- undir fráveru skúlastjórans hava ábyrgdina av leiðslu skúlans
- vera førur fyri at loysa trupulleikar
- saman við skúlastjóranum skapa virðing fyri skúlanum og umstøður hjá tí einstaka fyri medávirkan og medábyrgd

**Førleikakrøv**
Umsøkjarin skal hava fólkaskúlalæraraútbúgving og starvsroyndir í fólkaskúlanum.

**Lønar- og setanartreytir**
Starvið verður lønt sambært avtalu millum Føroya Lærarafelag og Fíggjarmálaráðið og verður sett sum sáttmálasett starv, uttan so, at tann, ið sett/ur verður, er tænastumannasettur lærari frammanundan.

Umsóknir við c.v. og avriti av prógvum skulu verða skúlastjóranum í hendi **í seinasta lagi mánadagin 23. juli 2006 kl. 16.**

Nærri fæst at vita um starvið við at venda sær til skúlastjórans á tlf 33 23 18 - 21 88 20 teldupostur mss@skulin.fo.

**www.skulin.fo/mss**

## Frá Havnar Handverkarafelag

Vegna summarfrí er skrivstova felagsins stongd **frá og við mánadegnum 23. juli 2007. Opið verður aftur mánadagin 20. august 2007.**

Eru átrokandi mál í hesum tíðarskeiðið, **kann** ringjast á fartlf. **234802.**

Heimasíða: www.handverk.fo
Teldupostur: handverk@handverk.fo
Fax: 354801

**Havnar Handverkarafelag**
Sjúrðargøta 20 · Box 203 · FO-110 Tórshavn